# Fimm sjónleikamettaðir dagar

**Mikukvøldið vórðu teir Norðurlendsku Sjónleikaradagarnir settir í Norðurlandahúsinum. Á setanini var norðurlendska dramatikaravirðislønin handað Jóanesi Nielsen, rithøvundi. Yrkingar vórðu lisnar upp og mentamálaráðharrin setti sjálva stevnuna**

SJÓNLEIKARADAGAR
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Fyri meir enn fullsettari Klingru kundi Páll Danielsen, formaður í Leikarafelag Føroya, bjóða vælkomin til setanina av Norðurlendsku Sjónleikaradøgunum.

Sjónleikaradagar, sum verða pakkaðir við leikum úr øllum Norðanlondum. Páll Danielsen nam við týdningin av sjónleiki í samfelagnum, og eitt sindur av søguni hjá sjónleikinum í Føroyum. Harafturat varð dreymurin um Tjóðarpall Føroya eisini tikin fram.

Eftir sjálva vælkomstrøðuna slapp Annika Hoydal framat. Hon las yrkingina »Thi natten kommer« eftir William Heinesen. Við einum hátíðarligum dámi resiteraði hon yrkingina fyri Klingruni.

Og so var tíðin komin at seta sjálva stevnuna. Ongin minni enn mentamálaráðharrin, Annlis Bjarkhamar, hevði fingið æruna av at seta stevnuna.



*Klingran í Norðurlandahúsinum var meira enn fullsett tá Norðurlendsku Sjónleikaradagarnir vórðu settir mikukvøldið*

Mentamálaráðharrin eisini við týdningin av sjónleiki í okkara landi, og nevndi hon tað stóru avbjóðing sjónleikurin fekk av tí sokallaða sjónvarpsmiðlinum.

– Men sjónleikurin yvirlivdi ikki bert, men stendur heldur bara sterkari enn hann nakrantíð hevur gjørt, segði Annlis Bjarkhamar millum annað í setanarrøðu síni.

– Ein kann siga, at í sjónleiki er tað einaferð fyri allar, hvørja ferð. Sjónleikurin verður føddur, livir og doyr, hvørja ferð hann verður vístur.

Annlis Bjarkhamar nevndi eisini, at umstøðurnar hjá sjónleiki í Føroyum eiga at betrast, og dreymurin um ein føroyskan tjóðarpall er ikki longur bert ein dreymur, men er so við at gerast til handling.

Eftir sjálva setanina kom tann løtan nógv hava bíða eftir. Salurin, sum var fullsettur av áhoyrarum, sjónleikarum, politikkarum og meinigum borgarum, sat í andakt og lurtaði meðan Guðjón Pedersen, formaður í Norðurlendsku Teaturuniónini, fortaldi øllum, hví dramatikaravirðislønin fall á Jóanes Nielsen.



*Meintamálaráðharrin, Annlis Bjarkhamer, hevði fingið æruna av at seta stevnuna*

### Uttan Grímu – ongin weekend

Seks leikir vórðu innstillaðir til norðurlendsku dramatikaravirðislønina, og har ímillum var »Eitur nakað land Week-end?« eftir Jóanes Nielsen.

– Leikurin er eitt drama í okkara tíð. Vit hitta Jóhannu og aðrar sjúklingar á eini psykiatriskari deild, har álvari og gaman er ein av styrkjunum hjá rithøvundinum. Teksturin er orginalur, er yvirraskandi og opnar okkara sinn, segði Guðjón Pedersen millum annað áðrenn virðislønin varð handað føroyska rithøvundinum.

Og tað vóru løgvabrestir, sum fagnaðu Jóanesi Nielsen tá dramatikaravirðislønin varð honum givin í hendi.

Í stuttari røðu nevndi rithøvundurin millum annað, at uttan Grímu, hevði leikurin helst ikki verið til. Hann vísti á, at Gríma er ein motiveraður bólkur av sjónleikurin, sum eggjar rithøvundinum.

– Jeg er beæret over at modtage Nordisk Dramatikerpris, segði Jóanes Nielsen at enda.

Eftir sjálva handina las Hans Tórgarð yrkingina Brúgvavakt eftir Jóanes Nielsen á svenskum.

Og setanin endaði við at Terji Rasmussen og Stamen Stantchev á klaver, framførdu yrkingina Kvøld, sum Jóanes Nielsen eisini hevur yrkt.



*Annika Hoydal las yrkingina »Thi natten kommer« eftir William Heinesen*



# Rok og fjøran í SMS

**Síðani farið varð undir umbyggingarnar í SMS, er mangt og hvat farið fram. Í løtuni er tann eina inngongdin afturlatin, meðan arbeitt verður í sama partinum. Ynskir tú at nýta toilettini, so mást tú fara út í túnið, har ein vognur er settur upp til sama endamál**

UMBYGGING
*Ragnhild Ellingsgaard*

Hóast nógva rokanin í SMS teir seinastu dagarnar kann ørkymla kundarnar eitt sindur, so er hetta ikki uttan endamál. Fyri stuttum varð farið undir stórar umbyggingingar í størsta handilsdeplinum í Føroyum, og tekinini um hesa umbygging eru nú rættiliga sjónskar.

Tann eina inngongdin í deplinum er afturlatin, so tú noyðist runt húsið, um tú ætlar tær innar. Hevur tú hinvegin tørv á at nýta toilettini, meðan tú ert í húsinum, so mást tú út í túnið, har ein vognur er settur upp til sama endamál.

Stóru máltíðirnar, sum Perlan vanliga borðreiðir við, eru heldur ikki tøkar í hesum døgum. Tó kanst tú keypa tær okkurt lætt til matna, og síðan seta teg niður eina løtu í øllum meldrinum.

Hóast hetta kann tykjast eitt sindur rokaligt og ørkymlandi fyri okkum, ið seta fótin inn í depilin fyri at keypa og hugna okkum, so er hetta ein liður í ætlanunum hjá leiðsluni um at gera úrvælið inni í SMS enn fjølbroyttari, enn tað longu er í dag.

Í septembur mánaða letur eitt stórt nýtt matstað upp, sum fer at bjóða okkum eina forkunnuga matarskrá. Burger King og Sunset Boulevard verður heitið á matstovunum, og slíkar hava ikki verið at sæð í Føroyum fyrr. Umframt hesar letur Perlan eisini uppaftur. Tó verður úrvalið í Perluni ikki heilt tað sama, sum vit eru von við.

Harafturat verður úrvalið av handlum eisini munandi broytt, tá onkur handil letur aftur, meðan onkur nýggjur letur upp.

Toilettviðurskiftini verða eisini mundandi betraði, og verða tey flutt yvir til økið, har posthúsið hevur hildið til.

Umbyggingarnar, sum nú fara fram, eru liðir í eini langtíðarætlan, sum leiðslan í SMS er farin undir. Talan er um tvey byggistig, og er hetta soleiðis tað fyrsta av hesum báðum. Væntandi verður hetta byggistig liðugt seinast í septembur mánaða, og síðan ganga eini tvey ár, áðrenn farið verður í holt við næsta byggistig.

Umframt alt hetta verða eisini aðrar broytingar á skránni. Tó er ikki komið út fyri almenninginum enn, hvørjar hesar verða. So nú er einki annað at gera, enn bara at bíða spent, til alt er kom í rætta lagið aftur.

*Nógv rokan er í størsta handilsdeplinum í Føroyum, og tekinini um stóru umbygginga eru rættiliga sjónsk*
*Mynd: Finnur Justinussen*



*Tann eina inngongdin er afturlatin, so tú noyðist runt húsið fyri at sleppa innum*
*Mynd: Finnur Justinussen*




# Vágin í Klaksvík verður kortløgd

**Seinastu vikurnar hava menn frá Landsverkfrøðinginum gjørt dýpdarmátingar á botninum í vágni í Klaksvík. Endamálið er at fáa botnin kortlagdan, soleiðis at Klaksvíkar Kommuna kann fara í holt við at dýpa ávís øki á botninum**

KANNINGAR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Seinastu tvær vikurnar hava ymsar kanningar verið gjørdar á vágni í Klaksvík. Tað eru menn frá Landsverkfrøðinginum, sum eftir áheitan frá býarverkfrøðinginum, hava verið í holt við at gjørt dýpdarmátingar av allari vágni, sum hon er.

Endamálið er at finna útav, hvussu lendið á botninum er, soleiðis at Klaksvíkar Kommuna kann fara undir at betra um møguleikan hjá teim størru farmaskipunum at leggja at bryggju á staðnum.

Nú eru mátingarnar so komnar at enda, og úrslitini verða kannaði. Endamálið er at fáa allan botnin kortlagdan, og verður farið í holt við hetta fyrsta dagin. Eftir ætlan skal hetta arbeiðið verða liðugt longu í hesu vikuni.

Lendið á botninum er, sum teim flestu kunnugt, ikki av tí besta, tá størri skip skulu leggja at í Klaksvík. Stórir steinar stinga seg upp ymsastaðni, og eisini er dýpdin á økinum sera ójøvn. Hetta førir í fleiri førum til trupulleikar, tá størri farmaskip, sum Clare og onnur, skulu leggja at bryggju.

Tí hevur Klaksvíkar Kommuna avgjørt, at ávís øki á botninum skulu dýpast, soleiðis at sleppast kann undan hesum trupulleikum.

- So skjótt, sum vit fáa kortið frá Landsverkfrøðinginum, fara vit í holt við sjálva dýpdargeringina, greiðir býarverkfrøðingurin frá.

Enn er tó ikki avgjørt, um arbeiðið verður gjørt við sandbáti, prami ella øðrum.

Harafturat eru eisini ætlanir um møguliga at útfylla ávís øki. Hetta verður tó ikki gjørt, fyrr enn dýpdargeringin er komin at enda.



*Fyrsta dagin verður vágin í Klaksvík kortløgd, og síðan verður farið undir at dýpa ávís øki*